# Íspunnið spinnarí

Rákið við samskiftisráðgevum er ein liður í professionaliseringini av samskiftinum, heldur Per Højgaard, samskiftisráðgevi

MIÐLARÀÐGEVING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Listin yvir føroyskar fjølmiðla- ella samskiftisráðgevarar er ikki av teimum longstu, men hann telir kortini fleiri nøvn, enn man kanska gevur sær far um. Í grannalondunum og aðrastaðni verður hugt rættiliga kritiskt at fólki við starvsheitum sum miðlaráðgevi ella líknandi.

Per Højgaard er útbúgvin journalistur men ber heitið samskiftisráðgevi. Hann hevur fast starv sum samskiftisfólk, men við síðuna av starvi sínum fæst hann stundum við at ráðgeva fyritøkum og øðrum um, hvussu tey kunnu bera sín boðskap fram. Hann heldur, at vit mugu ansa væl eftir ikki at gera hetta yrkið til meira, enn tað er.

– Tað, at ráðgeva um samskifti, er í prinsippinum ikki øðrvísi enn at ráðgeva um fíggjarlig, búskaparlig ella løgfrøðilig viðurskifti, sigur Per Højgaard.

Hann heldur tað, at fólk leita sær ráðgeving innan samskifti, vera eina natúrliga reaktion uppá, at fjølmiðlarnir alsamt hava størri vald og ávirkan.

– Tað er eitt grundleggjandi journalistiskt krav, at øll skulu hava eina rímiliga viðgerð í fjølmiðlunum. Øll eiga at kunna fáa síni sjónarmið fram, men hetta er ikki altíð líka lætt, tí journalistarnir eiga jú tann heilaga rættin at velja burturúr. Tí er týdningarmikið at duga at gera sín boðskap greiðan, einfaldan og málrættaðan. Annars er vandi fyri, at tú verður ikki hoyrdur og tí gerst ósjónligur í almenna rúminum, sigur Per Højgaard.

## Professionalisering

Sum tað eisini verður víst á aðrastaðni í blaðnum, so er tað einki nýtt, at eitt nú politikarar hava fólk við serligum kunnleika til samskifti knýtt aftur at sær. Eitt nú hava politiskir flokkar leingi fingið hjálp frá fólki, sum duga væl at skriva.

– Uttanlands er samskiftisøkið fyri stóran part professionaliserað, og helst byrja vit at síggja sama rák í Føroyum. Hetta er ikki løgið, tí flest øll onnur øki eru fyri somu broyting, sigur Per Højgaard.

Tað er greitt, at samskiftisráðgevin, sum fólk kanska minnast best frá hansara tíð sum tíðindamaður á Christiansborg í teimum døgum, tá landsstýrið og danska stjórnin tingaðust um økt sjálvstýri, ikki er so fegin um, at samskiftis- ella fjølmiðlaráðgevingin verður gjørd til mestsum at vera av tí ónda.

- Kjakið um spindoktarar er merkt av, at fleiri ikki rættiliga vita, hvat ein slíkur er. Í mínari verð er ein spindoktari ein, ið roynir at kroysta einvegis kommunikatión ígjøgnum og blokkerar fyri kritiskum spurningum frá fjølmiðlum og almenningi. Um so er, at til dømis ein almennur myndugleiki arbeiðir á slíkan hátt við samskifti sínum, hava vit eitt demokratiskt problem, sigur Per Højgaard.



*Per Højgaard er útbúgvin journalistur men ber heitið samskiftisráðgevi*

Hann heldur, at tað ofta eru fjølmiðlafólk, ið hava hug til at mála eina í so døkka mynd av yrkinum hjá fleiri ráðgevum.

– Hví er tað negativt, at fólk, sum skulu svara kritiskum spurningum, eru væl fyrireikað? Er tað ikki fremjandi fyri kjakið? Ella er tað so galið, at journalistar eru ímóti ella møguliga bangnir fyri kvalifiseraðum mótspæli? Hvør hevur fyrimun av at mála hin grábeinta upp á veggin?, spyr Per Højgaard.

Sjálvur heldur samskiftisráðgevin ikki, at tað síggjast týðilig spor av, at spunasmiðir virka í Føroyum. Tað er í øllum førum einki afturímóti tí, ið sæst í øðrum londum.

## Ov veikir

Dagsins føroyski politikari nýtir fitt av tíð í loftmiðlum ella á breddanum í bløðunum. Flest øll eru samd um, at hesin parturin av arbeiðsdegnum hjá politikaranum hevur stóran týdning. Mest hevur tað ivaleyst at siga fyri politikarar og valevni í høvuðsstaðnum. Vit hava fregnast eftir, hvat Per Højgaard heldur um støðið hjá føroyskum politikarum í fjølmiðlunum.

– Tað er ymiskt, hvussu væl føroyskir politikarar klára seg í fjølmiðlunum. Summi koma væl ígjøgnum við sínum boðskapi, men tað kann undra, at summi klára seg so illa, sum tey gera, sigur Per Højgaard.

Hann sigur seg hava varhugan av, at Finnbogi Ísakson mundi vera millum fyrstu politikarar, sum skaraði framúr við at fáa boðskap sín greitt fram í fjølmiðlunum. Finnbogi er útbúgvin tíðindamaður, og tað hevur hann dugað væl at nýtt til sín fyrimun, heldur Per Højgaard.

Ein annar føroyskur politikari, ið Per hevur hug at nevna, er Høgni Hoydal. Hann streyk fram í føroyskum politikki fyri seks árum síðani. Hann var eisini fjølmiðlafólk undan politisku yrkisleiðini og hevur útbúgving innan samskifti.

– Høgni Hoydal setti sítt samskifti í system - hann hevði eina strategi. Tað er ógvuliga týðiligt, at hann hevur hugsað um, hvussu tingini skulu leggjast fram, og hann hevur sum heild dugað væl at brúkt samskiftisteknikk og til dømis skapað myndir í høvdinum á móttakarunum, sigur Per Højgaard.

– Bæði Høgni og Finnbogi hava eina samskiftisfakliga bakgrund sum grundarlag. Tað sæst týðiliga, sigur Per Højgaard.

Spurdur, hvat føroysku politikararnir serliga kundu verið stinnari til í sambandi við fjølmiðlarnar, svarar Per, at nógv høvdu havt gott av at sett seg niður og funnið út av, hvat tey veruliga hava upp á hjarta, og so hildið seg til tað, tá tey stíga fram bæði úti millum fólk og í miðlunum.

Týdningurin, ið fjølmiðlarnir hava sum teir, ið seta dagsskránna t.d. í politikki, verður eftir øllum at døma ikki minni í framtíðini. Tað eru føroysku politikararnir eisini væl vitandi um.

– Nýggja ættarliðið av politikarum, sum er uppvaksið við fjølmiðlum, er enn meira vitandi um, hvønn týdning og vald miðlarnir hava, heldur Per Højgaard.

## Kvalifiserað mótspæl

Spurningurin er, um tað ikki kann gerast torført hjá føroyskum fjølmiðlum at standa ímóti, um spunasmiðir fara at gera um seg, tá hugsað verður um, at føroysku miðlarnir ferð eftir ferð fáa skotið í skógvarnar, at teir ikki eru nóg sterkir og vanta arbeiðsorku.

– Vandar eru altíð til staðar, men eg ivist í, hvussu umfatandi spunavirksemið í Føroyum man vera. Føroyskir fjølmiðlar eru heldur ikki so veikir, sum nógv siga. Eitt nú bókin "Skjót journalistin" vísir, at tíðindafólk kunnu hava stórt vald, um tey leggja í. Innihaldið í bókini elvdi jú óbeinleiðis til nýval. Men fíggjarliga og fakliga orkan í miðlunum er ikki tann størsta, og tí verða føroysku fjølmiðlarnir stundum noyddir at leypa upp um garðin, har hann er lægstur, sigur Per Højgaard.

Samskiftisráðgevin vísir á, at hvørki miðlarnir ella keldurnar hjá miðlunum mugu undirmeta, hvat fólk finna seg í at síggja og hoyra.

– Best er fyri allar partar, um journalistar eru væl fyrireikaðir og kritiskir, og "offur" teirra eru før fyri at koma við einum kvalifiseraðum mótspæli. Tað styrkir eisini um trúvirðið hjá báðum pørtum. Fólk leggja einki í mikrofonhaldarí, og fólk fáa heldur einki burtur úr tíðindaflutningi, har bert annar parturin er væl fyrireikaður. Fótbóltsdysturin nyttar lítið, um annað liðið er í góðari venjing og væl brynjað við góðum gaggum, meðan hitt liðið als ikki er í formi og spælir berføtt, sigur Per Højgaard, samskiftisráðgevi.

# Boðskapin út til fjølmiðlar og borgara

Ein kunningarráðgevi, sum dugur at skilja, hvussu fjølmiðlar hugsa, skal styrkja samskiftið hjá landsstýrinum úeftir. Løgmaður heldur, at politikararnir duga ov illa at fáa boðskapin fram

MIÐLARÁÐGEVING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Løgmansskrivstovan søkti herfyri eftir einum kunningarráðgeva. Tíðaravmarkaða starvið hevur ikki hissini arbeiðsuppgávur tengt afturat sær.

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, dylir ikki fyri, at hann kann hugsað sær ein persón, sum dugir at skilja, hvussu pressan hugsar og arbeiðir, sum hann málber seg.

- Politikararnir vita ikki nóg nógv um at fáa boðskapin fram, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað er so ætlanin, at hesin kunningarráðgevin skal virka fyri, at fáa tað rættan boðskapin út til miðlarnar, soleiðis at borgarin skilur hann.

- Men her so avgjørt ikki talan um nakra spindoktara. Her er tað ein spurningur um at duga at leggja síni sjónarmið fram. Vit hava ongan áhuga í at manipulera við miðlunum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Í skrivandi stund er kunningarráðgevin ikki settur, men setanin er mestur ikki meira enn nakrar dagar burtur.

## Fyri ritara

Tann nýggi kunningarráðgevin kemur fyri ein ístaðin fyri løgmansritaran. Anfinn Kallsberg hevði ein tílíkan ein part av sínari tíð sum løgmaður. Í Danmark verður hetta heitið rópt fyri ministersekretær. Men Jóannes Eidesgaard vil heldur hava ein kunningarráðgeva enn nakran ritara burturav.



*Løgmaður vil hava ein persón afturatsær, sum hugsar eins og fjølmiðlafólk*

- Vit vilja heldur hava ein persón at formidla tíðindi frá landsstýrinum og tí almenna út til fólkið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Arbeiðið hjá tí nýggja kunningarráðgeva fer eisini fyri tað nógv at snúgva seg um at vera bindilið millum landsstýrið og miðlarnar.

- Tað er týdningarmikið at hava ein persón, sum skilir, hvat

*Framhald á s. 16*



# Spunasmiðir, nýggju dukkuførararnir

Ein dugnaligur spunasmidur kann vinna valid fyri ein politikara, men kann eisini koma politikarum í trupulleikar. Tony Blair kom til valdi í Bretlandi, vid einum dugnaligum spunasmidi, og sídan tá hava spunasmidir fingid alt stórri vald og ávirkan á politikarar og fjølmidlar kring heimin. Spunasmidirnir eru dukkuførararnir á okkara døgum.

TINGHELLUKRONIKK
*Beinta Løwe Jacobsen*



Fjølmiðlar og politikkur hava onkursvegna altíð havt ávirkan á hvørt annað, og verið tengd at hvør øðrum.

Amerikanski forsetin Franklin D. Roosevelt hevði ein fastan tátt í amerikonskum útvarpi, har hann sat frammafyri eldstaðin og greiddi amerikonsku borgarunum frá støðuni í landinum og um politikkin hjá stjórnini í tredvinum. Hetta vóru millum best umtóktu útvarpssendingarar í USA tá í tíðini.

Seinni var tað enn ein amerikanskur forseti, ið nýtti miðlarnar at vinna sær atkvøður og tekki. Tað var tann ungi John F. Kennedy, ið tók seg væl út á skíggjanum. At byrja við var tætt millum Kennedy og mótvalevni hansara Richard Nixon, men tað endaði við einum sigri til Kennedy, ikki minst orsakað av sjónvarpssendingunum teir luttóku í. Tad var serstakliga tann fyrsta sendingin, ið gjørdi munin. Kennedy tókist at vera væl fyri, róligur og vælskorin fyri tungubandi. Nixon hin vegin, tóktist at vera ófyrireikaður og hevði heldur ikki somu fangandi útsjónd sum Kennedy.

## Spunasmiðir

Flestu politikarar og flokkar hava altíð, í størri ella minni mun, havt fjølmiðlaráðgevarar, røðuskrivarar og líknandi. Hesi hava sum oftast verið handan tjøldini og havt ein fjaldan leiklut. Men í dag eru tey framstandandi, og hava stóra ávirkan á tað, ið kemur fram í fjølmiðlunum og á tað, ið kemur frá politikarunum. Á fremmandamáli verða tey rópt spin-doctors, ella spunasmiðir. Orðið spin-doctor varð fyrstu ferð skrásett í 1984 og merkir "ein persónur, ið skal syrgja fyri at onnur tulka eina hending frá einum serligum sjónarhorni". Spunasmiðirnir kunnu kallast nýggju dukkuførararnir í okkara tíð. Teir hála í trægrirnar, og spinna netid fyri fjølmiðlar og politikarar. Teirra høvudsuppgáva er at fáa politkararnar at taka seg væl út, at duga at málbera seg og at syrgja fyri at fáa positiva umrøðu í fjølmiðlunum. At syrgja fyri at fjølmiðlarnir vera fóðraðir vid søgum, so teir ikki fara at leita sjálvir. Og at syrgja fyri at keðilgar søgur helst ikki koma út, og um tær gera tað, at fáa avleiðingarnar av teimun at vera minst møguligar.

Fjølmiðlar og spunasmiðir brúka og misbrúka hvør annan fyri at fáa positiva umrøðu av sær og sínum, og negativa umrøðu av mótstøðufólkunum, og fyri at fáa eina góða søgu.

Og ein fyrimunur hjá spunasmiðum er, at kappingin er so hørð millum fjølmiðlarnir. Fyri fjølmiðlarnar er tað ofta alt avgerandi at verða fyrst við einari søgu, og tí lata teir seg misbrúka.

Ofta er sambandi millum spunasmiðir og fjølmiðlar rættuliga gott. Oftani eru spunasmiðir fyrrverandi journalistar á miðlum, og hava tí tætt og gott samband við hesi, og vita hvussu hesi arbeiða og hvørjar søgur tey vilja hava.

## Blair og spunasmidurin

Fjølmiðlarádgevarar og spunasmiðir eru ikki nakað nýtt fyribrygdi í politikki. Men tey eru vorðin meir sjónlig, ikki minst orsakað av Labour og Tony Blair í Bretlandi. Tony Blair uppfann ikki spunasmiðin, men hann dugdi at brúka teir, og sá fyrimunirnar við teimun, og millum annað soleiðis kom hann fram at valdinum í Bretlandi, og situr har á sjeynda ári.

Fyrrverandi spunasmiðurin hjá Blair Alastair Campbell er eisini tann kendasti, og verður ofta mettur at vera tann fyrsti av tí slagnum vit kenna í dag.



Tá Tony Blair slapp inn um dyrnar í Downing Street 10 visti hann, at fjølmiðlarnir høvdu ávirkan, og at tað er týdningarmikið at hava gott samband vid teir, og at vera væl við tíðindafólk og fjølmiðlar. Saman við Alastair Campbell stýrdu Blair fjølmiðlunum við harðari hond. Útvald tíðindafólk fingu samrøður og upplýsingar, og Tony Blair fekk positiva umrøddu, og styrkti um støðu sína.

Campbell varð mettur at vera kongurin innan sítt fak. Hann var spunasmiður hjá Blair í níggju ár, men hann var eisini kallaður Prince of Darkness, tí hann arbeiddi í loyndum. Hann var skýrdur fyri at gera politikarar og fjølmiðlar til marionettdukkur í einum sjónleiki, har Campbell sjálvur var leikstjóri.

Hann hjálpti Blair at vinna valdi, men endadð sjálvur við at gerast ein góða søga fyri fjølmiðlarnar, og tað er ikki ætlanin við einum spunasmiði. Campbell fekk tann trupulleika, at tá ið hann segði nakað, varð tad ikki mett sum politikkur, men sum spinnarí.

Campbell hevur eisini sagt við danska blaðið Berlingske Tidende, "at nú um dagarnar trýr ongin nøkrum longur"!

Hetta er eisini við at gerast trupulleikin millum politikarar, fjølmiðlar og veljarar, tí hvørjum skal man trúgva, og hvat er politikkur, hvat er sannleikin og hvat er spinnarí?

## Blair sum fyrimynd

Tony Blair gjørdist ein væl lýddur og vælumtóktur politikari kring allan heim, ikki minst orsakað av spunasmiðinum Campbell. Hetta sóu politikarar aðrastaðni, og Labour gjørdist fyrimyndin, tá eitt val skuldi vinnast.

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen legði seg tætt uppat Blair og Labour í valstríðinum í 1998, og núverandi danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen og flokkur hansara Venstre høvdu eisini Blair og Labour sum fyrimynd, tá tey vunnu valið í 2001. Eins og Blair var myndin uppá Labour, so gjørdist Fogh myndin av Venstre.

Tann kendasti spunasmiðurin í Danmark er Henrik Qvortrup, ið arbeiddi fyri Anders Fogh Rasmussen, og hann hevur sagt vid danska blaðið Information:

"Ein spunasmiður skal royna at fáa menniskja handa politikaran fram. Arbeiðið hjá mær var at fáa sannført vanlig fólk um, at tað er eitt menniskja handan persónin við stingandi eygunum - Anders Fogh", hevur Qvortrup sagt við blaðið um tíðina, tá ið hann arbeiddi fyri Vinstra. Í dag er Qvortrup redaktørur á Se og Hør, og stýrir blaðnum við harðari hond.

## Kríggj og spunasmiðir

Eisini í vápnaðum stríðum verða spunasmiðir nýttir, tí tað er serstakliga í kríggi at tað er týdinngarmikið at duga at takla miðlarnar, eisini tá ið mistøk henda. Tá ið NATO av misgáum bumbaði nøkur sivil fólk í Kosovo krígnum nýtti talsmaðurin hjá NATO orðið "collateral damage" ella óhepnar avleiðingar. Og tá í kríggið í Irak brast á, syrgdi amerikanska stjórnin fyri einum fjølmiðlasentri við hátøkni, og við grafikki á stórskíggja, so flogfør og annað tóku seg út sum eitt telduspæl.

Eisini vísti tað seg, at søgan um herkvinnuna Jessicu Lynch, sum amerikanskir hermenn høvdu bjargað frá irakum ikki var heilt sonn. Lynch varð ikki álopin, hon hevdi verið fyri einum ferdsluóhappi, og var endað á sjúkrahúsi. Søgan var íspunnin!

Og tad var júst stríðið í Irak, id gjørdi at Alastair Campbell varð noyddur at siga seg úr starvi. Hetta tí at BBC vildi vera við, at hann hevdi roynt at prýtt um frágreidininga um Irak-kríggið.

Men longu tá var tað farið ov vítt vid politiskum spunasmiðum í Bretlandi.

## Gølan

Tí tad, sum gjørdi at bretar av álvara mistu álitið á tíðindnum, ið komu frá Blair-stjórnini, var ein hending, ið kom fram í samband vid álopið á USA 11 september 2001. Stóra søgan henda dagin í fjølmiðlum kring heim var sjálvandi álopið á USA. Og tað visti spunasmiðurin hjá enska ferðslumálarádnum Jo Moore eisini. Hon sendi tí ein teldupost út til hini ráðini og segdi, at 11. september var ein góður dagur at jarða keðiligar søgur. Fjølmiðlarinir fingu fatur á teldupostinum, og so var alt á gosi. Seinni var sami framferðarháttur nýttur, tá mamma ensku drottningina fór til jarðar, og tá var tolið uppi hjá bretum. Avleiðingin av hesum var, at bæði Moore og ferðslumálaráðharrin Stephen Buyers fóru frá.

Sæð út frá einum journalistiskum sjónarhorni, so hevði Jo Moore rætt, tí 11. september var ein góður dagur at almannakunngera keðiligar søgur, tí tey mundu vera fá, ið hugsaðu um annað, enn álopini á USA. Hugsa vit moralskt er støðan sjálvandi ein onnur.

Men í øllum førum hevði henda gøla keðilga ávirkan á trúvirðið hjá Blair stjórnini.

## Heftir serfrøðingar

Hyggja vit eftir kjakinum í samband við amerikanska forsetavalið, síggja vit eisini at alt verdur stýrt av spunasmiðum, fjølmiðlarádgevum og sokallaðum "serfrøðingum", id gera viðmerkingar til kjakið millum Bush og Kerry.

*Framhald á næstu síðu*